# Avdúkar krabbamein

Nýggj gransking vísir, at tað ber til at avdúka krabbamein í lungunum við at skanna lunguni. Mannagongdin kann samanberast við mammografi, sum verður brúkt, tá kannað verður, um kvinnur hava bróstkrabba. Granskararnir vóna, at tann nýggi kanningarhátturin kann bjarga mannalívum, men teir eru ósamdir um, hvussu góður hesin hátturin er. Summir granskarar vænta, at skanningin fer ikki at geva fullfíggjað úrslit.

# Arbeiðsávísing á netinum

ALS

Arbeiðssøkjandi, sum sóknast eftir tí rætta arbeiðinum, og arbeiðsgevarar, sum sóknast eftir tí rætta starvsfólkinum, hava nú ein nýggjan møguleika at náa á mál. www.starv.fo er ein arbeiðsávísing á internetinum, har partarnir á arbeiðsmarknaðinum kunnu koma í samband við hvønn annan. Á starv.fo kunnu øll arbeiðssøkjandi við føroyskum p-tali og allir arbeiðsgevarar við føroyskum v-tali skráseta seg og síggja, um nakað arbeiði og nakað starvsfólk er, sum samsvarar við júst teirra tørv og ynskir.

# Vatn verður líka dýrt sum olja og gass

**Ein íløga í vatn er ein trygg íløga, siga serfrøðingar.**

RÁEVNI
*Árni Joensen:*
*arni@sosialurin.fo*



*Sambært Credit Suisse kann ráevnið úr Sumbiartunlinum vera eins nógv vert sum tað, ið vónandi fer at koma úr føroysku undirgrundini*

Hevur tú hug at seta pengar í onkra trygga vinnu, so eru gull, olja og gass nøkur góð boð. Men um stutta tíð verður tað líka skilagott at seta pengarnar í vatn.

Tað er í hvussu er boðskapurin hjá viðurkenda sveisiska bankanum Credit Suisse. Í einari nýggjari frágreiðing skrivar virðisbrævaserfrøðingurin hjá bankanum, Markul Machler, at um fá ár verður so stórur eftirspurningur eftir drekkivatni, at vatn verður líka virðismikið, sum olja og gass eru í dag.

Frágreiðingin "Security and conflict", sum Markus Machler og aðrir serfrøðingar hava skrivað, hevur fleiri tilmæli um, hvar fólk og feløg eiga at seta sínar pengar, og teirra niðurstøða er, at ein íløga í vatn er ein trygg íløga.

Ein spurnarkanning, sum Credit Suisse hevur gjørt í Evropa, vísir, at um allan heimspartin stúra fólk fyri, at einki reint drekkivatn verður eftir í brunnunum. Tí verður neyðugt at keypa vatn.

**Føroyskt vatn**

Gongst sum tælað sleppa fólk inni á evropeiska meginlandinum at drekka føroyskt vatn um ikki so langa tíð. Í september í 2004 fekk Fimmboði Lisberg eitt 20 ára loyvi frá landsstýrinum at taka vatn úr Sumbiarbergholinum, og nú er verkætlanin komin so mikið væl áleiðis, at um stutta tíð fáa íleggjarar tilboð um at seta pening í hana.

Fimmboði Lisberg sigur, at allar forkanningar og fyrireikingar eru lidnar, og at tilfarið, sum skal leggjast fyri íleggjararnar, verður klárt um einar fjúrtan dagar.

Kanningarnar hava víst, at tað verða eingir trupulleikar at finna marknað. Teir størstu eru í Evropa. Mett verður, at fransmenn, bretar, italiumenn og spaniumenn drekka einar 10 milliardir litrar av vatni úr fløskum um árið.

Fimmboði Lisberg hevur fingið loyvi at taka vatn 1565 metrar inni í Sumbiarbergholinum. Har renna umleið 30 litrar um sekundið. Ætlanin er at leiða vatnið úr lopransmegin, og har verður sjálvt virkið eisini bygt.

Fimmboði Lisberg vil ikki siga, hvat verkætlanin kemur at kosta, men hann viðgongur, at tilgongdin hevur verið sera spennandi, og at útlitini eru góð.

# Stór føroysk nøvn á sangskrivaraverkstaði

**Eivør Pálsdóttir, Eyðfinn Jensen, Guðrið Hansen og Dánjal Neystabø eru saman við Jóan Petur á Stongunum føroysku nøvnini á sanskrivaraverkstaðnum hjá Bret Perkins.**

TÓNLEIKUR
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*



Vikuskiftið 27. – 29. oktober verður verkstaður fyri sangskrivarar við amerikumanninum Brett Perkins í Musikkskúlanum í Havn.

Verkstaðurin er fyri føroyskar og danskar sangskrivarar. Føroysku luttakararnir á verkstaðnum eru Eivør Pálsdóttir, Guðrið Hansen úr Isadora and The Rebels, Eyðfinn Jensen, ið m.a. er kendur sum ein av monnunum handan Poppkorn, Meyla og Knøtt og Brand Enni. Men Eyðfinn hevur verið virkin í nógv ár, og hevur luttikið í nógvum ymiskum samanhangum, eitt nú klassisku føroysku popputgávuni hjá Eyðfinni og Kára. Eisini luttekur Tagz'arin Dánjal á Neystabø og Jóan Petur á Stongunum, ið m.a. hevur verið virkin sum barrtónleikari saman við Finni Jensen.

Donsku luttakararnir eru Rikke Lie, Kenneth Thordal, Mikkel Engell, Sine Bach Rüttel og Anja Frøslev, meðan grønlendska stórtalentið Angu eisini luttekur.

Verkstaðurin um sangskriving endar við eini konsert í Klingruni í Norðurlandahúsinum sunnukvøldið 29. oktober kl. 19.30, og einum almennum kunningarkvøldi um sangskriving og tónleikaídnaðin í Dansistovuni í Norðurlandahúsinum mánakvøldið 30. oktober kl. 19.30. Aftan á tað verður jammkvøld í Hafnia Lounge. Tiltøkini eru samskipað av Norðurlandahúsinum, FUT og Dansk Artistforbund.


HÚSAMEKLING
www.husamekling.fo
Keyp og søla av fastari ogn
tel 31 93 21



**430 Hvalvík**
Støðd á húsum: 68,7 m² x 2 + loft
Støðd á grundøki: 606 m²
Byggiár: 2006 / 2007
Kostnaður: Kr. 1.400.000,-



**645 Æðuvík**
Støðd á húsum: Uml. 100 m² + loft
Støðd á grundøki: 1038 m²
Byggiár: Uml. 1978, víðkað í 1986
Kostnaður: Hóskandi boð ynskist




**373a og 376a, 380 Sørvágur**
Støðd á húsum: -
Støðd á grundøki: 1526 m² innangarðs, 2 gyllin uttangarðs
Kostnaður: Hóskandi boð ynskist



**Húsadalsvegur 6, 380 Sørvágur**
Støðd á húsum: 111,5 m² x 2
Støðd á grundøki: 725 m²
Byggiár: 1987
Kostnaður: Hóskandi boð ynskist



**J. Dahlsgøta 2, 100 Tórshavn**
Støðd á húsum: 207 m² / 124 m² + loft
Støðd á grundøki: 479 m²
Byggiár: 1970
Kostnaður: Hóskandi boð ynskist



**Niðaragøta 110, 188 Hoyvík**
Støðd á húsum: 60 m² x 2 + 2 útbygningar
Støðd á grundøki: 270 m²
Byggiár: 1992
Kostnaður: Hóskandi boð ynskist

VAGLIÐ · FO-100 TÓRSHAVN · TEL 31 93 21 · FAX 31 93 31